# Tríggir nýggir í nevndina

Róin Schrøter, Jákup Martin Joensen og Fríðin Ziskason eru nývaldir limir í starvsnevndini hjá FSF. Teir avloysa Rúna Heinesen, Magnus á Stongum og Svein Tróndarson. Valið av nýggju nevndarlimunum var liður í samlaðu semjuni hjá feløgunum, sum í heyst gjørdu av, at bæði nevnd og aðalskrivari skuldu skiftast. Hartil var Heðin D. Poulsen eisini uppstillaður av veinginum, sum royndi at bróta semjuna, men hann fekk ikki nóg nógvar atkvøður til beinleiðis nevndarval. Ístaðin er hann nú varalimur saman við Mortani Poulsen.



# Alt samtykt

Eingin ivi var um, at forsetavalið var tað, sum øll eygu vóru vend ímóti, tá 31. aðalfundurin hjá FSF varð settur. Sjáldan hevur tað gingið somikið skjótt at avgreiða innkomnu málini, sum tað gjørdi hesaferð. Formansfrágreiðingin var væl stytri, enn hon vanliga hevur verið, og broytingarnar í kappingarreglunum, viðgerðin av roknskapinum og upptøka av nýggjum limi vórðu framd uttan stórvegis hóvasták. Ja, somikið skjótt gekk tað fyri seg, at onkur fyrrverandi starvsnevndarlimur helt fyri, at hetta var ein fínur taktikkur, um mann vildi hava mál av týdningi samtykt, uttan at aðalfundurin veruliga lætst um vón.




Anfinn V. Hansen stóð fyri bæði dramatikki og undirhaldi, tá hann heldur óvæntað mátti taka sæti sum fundarstjóri á FSF-aðalfundinum
Mynd: Álvur Haraldsen

# Fundarstjórin í fokus

**Størsti dramatikkurin á aðalfundinum hjá FSF hendi, áðrenn fundurin sjálvur varð settur**




Jákup Mørk

Tað var ein bumba, sum varð slept, tá portalurin fríggjakvøldið skrivaði um eit løgfrøðisligt upprit, sum ætlaði fundarstjórin, Jens Wang, hevði gjørt til aðalfundin hjá FSF.

Reglurnar fyri, hvør hevur rætt at greiða atkvøðu á aðalfundinum, siga, at felag skal hava havt lið í bæði yngru og vaksnu deildunum í farna kappingarárinum. Og fyri SÍ og SÍF avleiddi hetta eitt ivamál.

Feløgini hava nevnliga havt lið í yngru deildunum og í oldboys, og umsitingin hevði tí biðið løgfrøðingin gjørt upprit, um hetta gav atkvøðurætt.

Og tað helt Jens Wang ikki. Avleiðingin varð, at skuldi hann stýra fundinum, so høvdu hvørki SÍ ella SÍF atkvøðurætt, og tað fekk øði í grindina.

Í fyrsta lagi varð roknað við, at hetta kostaði sitandi forsetanum, Høgna í Stórustovu, tvær atkvøður í forsetavalinum, og tað vildi hann ikki lata um seg ganga. Fundarfólkið mátti tí bíða í trý korter, meðan starvsnevndin sat á kreppufundi, og úrslitið av hesum fundinum varð, at Anfinn V. Hansen í skundi varð tilkallaður sum nýggjur fundarstjóri.

Umframt at útmerka seg við fleiri skemtiligum viðmerkingum, hevði nýggi fundarstjórin eisini eina øðrvísi fatan av juridiska spurninginum.

Í fyrstu atløgu vildi hann ikki lata feløgini greiða atkvøðu um broytingar í kappingarreglunum, tí bara eitt felag ynskti hetta. Men tá hann so eftir steðg upp á eitt korter setti fundin, boðaði hann frá, at hann metti SÍ og SÍF hava atkvøðurætt.

Í grundgevingunum fyri hesum segði Anfinn V. Hansen, at hann sum so einki hevði ít at finnast at mótvegis uppritinum hjá Jens Wang. Men hann vísti á, at støðan fyri einum ári síðani var júst tann sama, og tá høvdu bæði SÍ og SÍF rætt at greiða atkvøðu. At broyta hetta í evstu løtu, helt hann vera sera ósiðiligt, og tí mælti hann til, at FSF til komandi aðalfund hevur fingið greiðari reglur um hendan spurningin. Men sló samstundis fast, at SÍ og SÍF høvdu rætt at greiða atkvøðu á fundinum.

# FSF til arbeiðis

**Vónandi eru ósemjur og gamalt agg nú lagt aftur um bak, soleiðis at ein nýggjur forseti við greiðum stuðuli frá nevndini kann fara til arbeiðis**

ÍTRÓTTARKLUMMAN
*Jákup Mørk*
jakup@sosialurin.fo



Tíbetur helt semjan!

Ikki tí tað avgjørt er neyðugt, at forsetin fyri FSF eitur Christian Andreasen heldur enn Høgni í Stórustovu. Og ikki tí nývaldu nevndarlimirnir neyðturvuliga eru so nógv meira kompetentir enn teir, sum leygardagin fóru úr sessum sínum.

Men tað átti at staðið øllum greitt, at útskifting mátti til. Tað var einmælta semjan, tá aðalskrivarin varð biðin um at fara úr starvi sínum í heyst, og tað var semjan, sum at enda bar á mál, tá aðalfundurin leygardagin kundi staðfesta, at tað, sum kundi skiftast út, nú var skift út.

Tí tað vildi verið ein vanlukka, um skipaða samgongan fall í kongunum undan seinasta leikinum. Ein vanlukka, tí tað aftur vildi hildið føroyskum fótbólti í eisini støðu, har forsetin als ikki hevið tað vald, sum ein forseti eigur at hava, men ístaðin í tvey ár afturat skuldi verið partur av eini nevnd, sum ikki vil vita av sama forseta.

Nú er tann parturin greiddur, og so ræður um at koma til arbeiðis. Ein umskipan av valdinum í føroyskum fótbólti stendur fyri framman, og tað er altavgerandi, at hendan verður gjøgnumførd sum skjótast. At vit í framtíðini hava eina nevnd, ið virkar sum nevnd við strategiskum málsetningum. At vit hava eina nevnd, sum smíðar karmarnar, sum føroyskur fótbóltur skal virka undir, meðan umsitingin er tað embætisverk, sum fremur setta politikkin í verki.

Fundurin í heyst og aðalfundurin settu eina feita striku undir, at tað eru føroysku feløgini, sum eiga FSF. Nú er umráðandi, at somu feløg halda sín setning, soleiðis at tey leypandi eru við til at seta stóru linjurnar út í kortið, men at tey samstundis geva nevndini tann frið og tað álit, sum krevst, tá stórar umskipanir skulu fremjast.

Valstríðið er av. Farið nú til arbeiðis!

# Konubrot fingu serliga virðisløn fyri OL-brøgd

**Á vetrarleikunum á Vancouver hava Joannie Rochette og Petra Majdic framt avrik og brøgd langt út um tað vanliga**




Heri Simonsen

Tað er ikki altíð, at tað eru gullvinnararnir sum standa best í minninum hjá fólki, tá olympiski vetrarleikirnir eru lidnir.

Joannie Rochette úr Kanada vann bronsu í listskoyting og Petra Majdic úr Slovenia vann bronsu í skíðrenningar-sprintkappingini.

Men bæði hesi bronsuheiðursmerkini vóru vunnin undir ógvuliga hørðum, ómenniskjaligum umstøðum.

Fáar dagar áðrenn Joannie Rochette skuldi á skoytibreytina, fyri at royna at vinna eitt heiðursmerki fyri Kanada, doyði mamma hennara av hjartasteðgi.

Tá Petra Majdic skuldi royna seg í skíðrenningar-sprintkappingini breyt hon fýra rivjabein undir upphitingini. Hon vildi kortini ikki svíkja sítt land, og undir óvanligum, ómenniskjaligum umstøðum eydnaðist tað henni at vinna bronsu við nógvari pínu, og var tað ikki meir enn, at hon orkaði at taka ímóti bronsuni.

Joannie Rochette og Petra Majdic



hava báðar fingið ta sonevndu "Terry Fox virðislønina" fyri ótrúligu brøgd síni á vetrarleikunum í Vancouver.

Terry Fox virðislønin er uppkallað eftir kanadiska marathon-rennaranum, Terry Fox, sum doyði av krabbameini í 1981, aftaná at hava fingið annað beinið amputerað.

Vanliga verður Terry Fox virðislønin bara latin til ein persón, men dómsnevndin valdi at gera eitt undantak, tá tey høvdu í huga tey ótrúligu brøgdini hjá Joannie Rochette og Petru Majdic.

Báðar vóru rørdar, tá tær fingu virðislønina frá Betty og Rolly, foreldrunum hjá Terry Fox. Joannie Rochette helt eina rørandi takkarrøðu, har hon mintist aftur á mammu sína.